Ítróttar
Sosialurin
Nr. 106 • týsdagur • 6. juni 2006 • 80. árgangur • www.sosialurin.fo




*- Tá eg havi sæð greinar í bløðunum um spæliloyvið, havi eg latið verða við at lesa tær, og tí havi eg slettis ikki fylgt við í málinum. Fólk, sum eg tosi við, spyrja nógv um málið, men tað er ringt at sleppa undan, sigur Páll Mohr Joensen*

# Páll letur seg ikki órógva av nógvu umrøðuni

**– Fyrstu dagarnar var tað undarligt at hoyra mítt navn nevnt, men eg havi síðani latið verða við at fylgt við i málinum og havi heldur konsentrera meg um fótbóltin, sigur Páll Mohr Joensen, sum hevur verið í miðdeplinum í einum máli um eitt ógreitt spæliloyvi**

FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Seinastu vikurnar hevur navnið á Páll Mohr Joensen verið nevnt umaftur og umaftur í einum máli, ið ikki er serliga hugaligt fyri ein fótbóltsspælara ella eitt felag.

Páll Mohr Joensen spældi tann 25. mars steypadyst fyri HB ímóti VB/Sumba, men hann hevði ikki spæliloyvið í lagi. Hvussu umstøðurnar kring hetta manglandi spæliloyvið vóru, og hvør hevði ábyrgdina av, at alt ikki var í lagi, hevur verið stóra stríðsmálið seinastu vikurnar.

Kappingarnevdin hjá FSF gjørdi í síðstu viku av, at HB skal tveitast úr steypakappingini orsaka av hesum manglandi spæliloyvi, men HB hevur kært málið til dómsnevndin hjá FSF – og tað fyri aðru ferð.

Málið hevur órógvað bæði HB og steypakappingina í fleiri vikur, og í miðdeplinum fyri alt stríðið hevur verið ein ósekur fótbóltsspælari.

– Fyrstu dagarnar var tað undarligt at hoyra mítt navn nevnt í hasum samanhanginum, men eg havi síðani latið verða við at fylgt við i málinum og havi heldur konsentrera meg um fótbóltin, sigur Páll Mohr Joensen.

## Lesur ikki greinar um málið

19 ára gamli Páll Mohr Joensen hevur seinastu tvey árini rættiliga verið á veg sum álopsspælari á besta liðnum hjá HB, og eftir at hann í fjør varð leigaður NSÍ nakrar mánaðir, skuldi hann í ár stríðast fyri einum plássi á HB-liðnum.

Og tað hevur hann gjørt við góðari eydnu. Páll hevur spælt í álopinum flestu dystirnar, og tað hevur gingið væl hjá honum. Fimm mál í 10 dystum er gott fyri ein ungan álopsspælara, og tekin hava verið um, at Páll av álvara fer at býta seg fastan á HB-liðnum.

– Eg haldi ikki, at málið um spæliloyvið hjá mær hevur nervað fótbóltsspælið hjá mær yvirhøvur. Eg havi bevíst latið verða við at hugsa um tað, og tað hevur gingið væl, sigur Páll.

– Tá eg havi sæð greinar í bløðunum um spæliloyvið, havi eg latið verða við at lesa tær, og tí havi eg slettis ikki fylgt við í málinum. Fólk, sum eg tosi við, spyrja nógv um málið, men tað er ringt at sleppa undan, sigur hann.

## Steypið á ólavsøku

HB hevur eftir eina heldur trilvandi byrjan rættiliga fingið gongd á sítt spæl, og úrslitini eru farin at vísa seg. Í gjár vann HB ímóti NSÍ og liggur nú sum nummar trý í Formuladeildini – beint aftanfyri EB/Streym og GÍ.

– Vit hava spælt væl seinastu dystirnar, og vit hava fingið nógv stig í hesum dystum. Vit byrjaðu ikki serliga væl, men soleiðis hevur tað verið onkuntíð fyrr í HB. Nú haldi eg, at rættilig vend er komin í, og liðið er komið ordiliga í gongd, sigur Páll M. Joensen.

Og meðan HB er við í stríðnum í toppinum í Formuladeildini, eru teir í løtuni uttanfyri steypakappingina. Ein seinasta avgerð er eftir at taka í dómsnevndini, og hon verður tikin í næstum.

Páll Mohr Joensen vónar, at HB sleppur at halda fram í steypakappingini, og hann hevur ein dreym um steypafinaluna.

– Tað hevði verið stuttligt at sloppið at tikið ímóti steypinum frá Óla Holm á ólavsøku, sigur hann

## Uttanfyri við skaða

Páll Mohr Joensen spældi ikki við, tá ið HB í gjár vann á NSÍ. Ein vøddaskaði í búkinum forðaði fyri, at hann kundi spæla.

- Eg veit ikki, hvussu álvarsamur skaðin er, men eg vóni ikki, at eg verði uttanfyri í longri enn tvær ella tríggjar vikur, sigur Páll Mohr Joensen.

## Heine Fernandes dømdur fyri stuldur



*Heine Fernandez*

Fyrrverandi HB-venjarin fekk í farnu viku 14 daga treytaða fongsulsrevsing fyri at hava stolið bilin hjá einum fótbóltskollega. Hendingin fór fram í 2003, tá ið Heine Fernandez undir eini veitslu tók bilin hjá fótbóltsspælaranum Mohammed Zidan, og tvær ferðir koyrdi fram við reyðum ljósi, áðrenn hann varð steðgaður av løgregluni.

Nú hevur málið verið fyri í rættinum, og Fernandez viðurkendi, at hann hevði tikið bilin, uttan at hava spurt um loyvi. Tað metti dómarin, hann skuldi hava 14 daga treytaða fongsulsrevsing fyri, umframt at hann fekk 2.500 krónur í bót, skrivar BT.

– Hetta hevur verið forferdiligt at havt hangandi yvir høvdinum, og tað er gott, at alt nú er av, sigur Fernandez við BT.

## Holland vann EM fyri U21

Sunndagin spældu Holland og Ukraine finalu í EM fyri U21-landslið. Úrslitið av finaluni gjørdist, at Holland vann dystin 3-0. Huntelaar úr Ajax skoraði tvey av málunum og gjørdist toppskjútti í kappingini. Venjari hjá hollendska U21 landsliðnum er Foppe de Haan, sum í fjør vitjaði í Føroyum. Tá helt hann skeið fyri venjarum hjá FSF og arbeiddi tríggjar dagar við ungdómsvenjarum og ungdómsspælarum hjá KÍ.